## óðveldisflokkurin:

# ava alment gnumskygni



*- Nevndin í Føroyagrunninum hevur fulla heimild at "handla", sum hon hevur gjørt, tí nevndin er suveren, men eg undrist kortini yvir, at nevndin ikki velir at fylgja politiska viljanum, sigur Heidi Petersen*

*Mynd: Snorri Brend*

umboð í grunnin – um landsstýrismaðurin heldur, at tað er ynskiligt, sigur løgtingskvinnan.

Hon vísir á, at tá ið sølur av almennum ognum soleiðis fara fram uttan útboð og gjøgnumskygni, fer almenningurin altíð at seta sær spurningin, um nóg nógv fekst fyri hesar ognir.

- Hetta verður ein standandi spurningur, sum ongantíð verður svaraður, tí borgarin veit ikki, um onkur annar kundi havt bjóðað meira. Tjóðveldisflokkurin tekur ikki undir við, at almennar ognir verða seldar á henda hátt, sigur Heidi Petersen, løgtingskvinna, at enda.

## Sambandsflokkurin:

# Óvirðiligur søluháttur

**Sambandsflokkurin og Norðoya Sambandsfelag hava ikki somu meiningar um søluna av partabrøvunum í JFK-fyritøkuni**

JFK
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Sambandsflokkurin hevur sent út tíðindaskriv, har flokkurin fegnast um, at gongd er komin á at einskilja almennar fyritøkur, men vísandi til málið um søluháttin í JFK-málinum, heldur flokkurin, at framferðarhátturin í hesum máli er "óvirðiligur" fyri eitt nútíðarsamfelag, sum tikið verður til.

Flokkurin sigur, at tað eru fá lond í heiminum, har tað almenna er við í so stórum parti av vinnufyritøkum sum í Føroyum, og flokkurin sigur seg staðiliga hava mælt til, at vit sleppa okkum burtur úr hesi støðu sum skjótast.

### Seld útvaldum

- Men tað, sum nú er hent við søluni av JFK er ikki tann einskiljingartilgongdin, sum Sambandsflokkurin vil virka fyri. Tað er okkara áskoðan, at allar vinnufyritøkur og grunnar, sum virka undir vanligum marknaðartreytum, eiga at verða einskild. Men hetta skal gerast á einum fríum marknaði, har øll hava sama møguleika at keypa.

Flokkurin góðtekur ikki, at landsins virðir verða seld útvaldum persónum fyri ein "ógvuliga ivasaman kurs, sum eingin hevur møguleika at eftirkanna", sum sagt verður.

- Sølur av slíkum slag eiga at verða gjørdar við fullum gjøgnumskygni, heldur Sambandsflokkurin og vísir á, at talan eigur ikki at verða um, at persónar ella lokalsamfeløg eiga at hava framíhjárættindi til landsins ognir.

### Ynskir góðan byr

Samstundis, sum Sambandsflokkurin hevur sent út tíðindaskriv, har funnist verður at søluháttinum í JFK-málinum, hevur Norðoya Sambandsfelag sent út eitt skriv, har felagið metir tað vera ein sigur fyri Noyðoyggjar, at "lokalar kreftir standa saman um at fremja hesa djørvu verkætlan…"

Norðoya Sambandsfelag fegnast um, at avtalan kemur at "tryggja nøkur av størstu virðunum í høvuðsvinnu okkara rótfesti í Norðoyggjum…"

- JFK hevur altíð verið stoltleikin hjá norðoyingum, og tí fegnast vit um, at JFK nú umsíðir aftur er á privatum hondum, sum hava sínar røtur í lokalsamfelagnum, sigur Norðoya Sambandsfelag.

# já Føroyagrunninum

fyritøkuni og hava ætlanir um at betra um handilsligа grundarlagið hjá felagnum.

### Sáar iva

Feløgini siga, at tey ivast í rættleikanum í, at landsins hægst valdi persónur sáar iva um álitið á nevndini í Føroyagrunninum, og í hesum sambandi vísa tey til tað, sum løgmaður hevur sagt um málið.

- Undirritaðu feløg hava umboðan í nevndini í Føroyagrunninum, og meta vit nevndina í grunninum vera dugnaliga og álítandi.

Arbeiðarafeløgini vísa á, at nevndin í grunninum hesi seinastu 12 árini hevur økt um eginogn grunsins við meira enn 120 milliónum krónum – úr 1,5 milliónum krónum í 1993 til 122 milliónir krónur í dag.

- Vit ynskja JFK-samtakinum alt tað besta í framtíðini og vænta, at politiski myndugleikin letur málið fáa frið - og tekur til eftirtektar fulla myndugleika grunsins, siga Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag.



*- Tað hevur stóran týdning fyri okkum, at friður valdar um størsta arbeiðspláss í Klaksvík*